## Søkir stjóra

Jákup á Dul Jacobsen leitar nú eftir stjóra til partafelagið Stórutjørn, sum skal byggja íbúðir, handlar, skrivstovur og ítróttarbygningar við Stórutjørn í Hoyvíkshaganum. Tað er advokatfyritøkan Annfinn V. Hansen, sum lýsir starvið leyst, og í lýsingini stendur millum annað, at umsøkjararnir skulu helst hava útbúgving innan leiðslu- og fíggjarstýring, men fólk við góðum royndum eru eisini vælkomin at søkja. Starvið er ikki tíðaravmarkað.

## Eigaraskifti

Tað er vorðið rættiliga vanligt, at føroyskar fyritøkur skifta eigarar, og nú hevur eigaraskifti verið í gomlu fyritøkuni Kemilux. Norðlýsið skrivar, at Jan Ziskasen hevur keypt ein lítlan helming av fyritøkuni. Heilt neyvt hevur hann keypt 49,5 prosent. Ein tilsvarandi part eigur stjórin í fyritøkuni, Debes Petersen, meðan Eyðfinn Jacobsen eigur eitt prosent. Jan Ziskasen starvast sum KT-stjóri hjá stóru fyritøkuni KRAFT í London.



*Panelfundurin við politikarum úr Norðoyggjum varð skipaður í samband við Torradagarnar sum vóru í Klaksvík alla vikuna*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Norðoyggjar ein kommuna

**Tað er ikki ein spurningum um at leggja saman, men meira hvussu og nær hetta verður gjørt. Fyri at fáa eina kappingarføra og sterka kommunu mugu eysturoyingar eisini við. Hetta var ein av niðurstøðunum á panelfundi í Klaksvík um vikuskiftið**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Steintór Rasmussen*
*stra@post.olivant.fo*

– Tað er ikki so nógv ein spurningur um mína meining. Vit ganga ímóti samanlegging og um eini 4 til 6 ár, so verða Norðoyggjar ein kommuna.

Orðini átti Pól Fuglø í Hvannasunds Kommunu. Tað tóktist ikki sum um hann persónliga var so heitur fyri at leggja saman, men kortini helt Pól tað vera rættast, at øll síggja hendan veruleikan í eyguni. Hóast fleiri av teimum fólkavaldu høvdu trupult við at svara ja ella nei uppá spurningin, um Norðoyggjar skulu verða ein kommuna, so vildi ongin leggja seg tvøran í hesum afturvendandi spurninginum.

Heldur ikki Magni Garðalíð á Húsum, sum tó saknaði eina ætlan og størri virðing fyri smáplássunum.

- Tað kann ikki verða ætlanin at vit bara lata matrikulin frá okkum og so onki meira.

Vit eru ikki ímóti at leggja saman við Klaksvík, men tað týdningarmesta er, at borgararnir í smærru kommununum eisini verða tiknir við uppá ráð og at ein samanlegging kemur øllum pørtum til góðar.

Eyðun Jacobsen, borgarstjóri í Svínoy ásannaði at hansara kommuna hevði merkt afturgongd og fráflyting seinnu árini, men umráðandi er, at vit ongantíð missa móti og royna at hyggja frameftir.

- Eitt gott ferðasamband er alt avgerðandi fyri Svínoynna. Eyðun legði afturat, at politiskt verður arbeitt við at leggja saman við Klaksvíkar Kommunu og Svínoyggin við sínum nógva upplandi og møguleikum fyri framtíðar flogferðslu eigur at vera áhugaverd fyri Norðoyggjar og allar Føroyar.

### Eysturoyingar við

Jógvan við Keldu, løgtingsmaður meldaði púra greitt út at hann var fyri samanlegging. Men fyrrverandi borgarstjórin í Klaksvík vísti samstundis á, at skal verða talan um eina stórkommunu í fremstu røð innan fiskiskap, skúla, handil og mentan, ja var tað umráðandi at fáa nakrar túsund eysturoyingar við afturat.

Steinbjørn O. Jacobsen sitandi borgarstjóri í Klaksvík dregur somu línu sum undangongumaður hansara í landsins næststørsta býi. Hann harmaðist og fýltist á, at Løgtingið skerjir tað kommunala sjálvræðið við ikki at lata borgararnar í Leirvík, Fuglafirði og Gøtu sleppa at velja hvønn vegin samstarvið skal verða.

### Fremstir innan fiskivinnu

Panelfundurin í Klaksvík leygardagin var sum heild spakur og uppmøtingin var so sum so. Spurningurin " Hvat vilja vit við Norðoyggjum" varð ongantíð greitt svaraður. Kjakast var eitt sindur um viljan hjá landspolitikarum at leggja almennar stovnar í Norðoyggjum og spurt varð um nyttuna í at leggja nøkur hissini fastlønt arbeiðspláss kring landið. Absalon í Buð, sum stýrdi fundinum, helt fyri, at um politiskur vilji og samanhald var tilstaðar, so kundi Norðoyggjar í framtíðini verið eitt kraftsentur innan fiskivinnu við øllum tí sum hetta innibar av gransking, kunnleika innan sigling, skúlaskap, fiskivinnustovu, matvøruframleiðslu og øllum almennum tænustum hesum viðvíkjandi.

### Byggið fleiri hús

Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri, segði, at hóast fiskivinnan fevnir um alt landið, so hava norðoyingar góðar traditiónir innan sjóvinnu og kunnu í framtíðini í uppaftur størri mun gerast eitt fiskivinnukraftsentur.

- Vit hava dugnalig sjófólk og fiskimenn. Tí er tað umráðandi at vit síggja møguleikarnar á heimskortinum. Men grundleggjandi fortreytirnar, hús, barnagarðar, skúli, samferðsla og trivnaður skulu vera í lagi.

Frá salinum varð havt at Klaksvíkar Kommuna, sum leingi ikki hevur orkað at metta tørvin av grundstykkjum.

Steinbjørn O. Jacobsen vardi seg við at siga, at ein orsøk til nógvs bygging og vøkstur í høvuðsstaðnum var, at privatir enterprenørar uppkeyptu jørð og seldu lidnar loysnir til privatfólk.

- Vit hava saknað hetta slagi av framfýsni innan byggivinnuna í Norðoyggjum, men nú eru glottar at síggja, eitt nú við íbúðunum í Ánunum, segði borgarstjórin í Klaksvík.